## Vil hava harða revsing

Kaing Guek Eav, sum var leiðari í einum fongsli hjá tí illa gitna Khmer-stýrinum í Kambodja, hevur biðið rættin geva sær ta harðastu revsingina, sum hann kann fáa fyri síni brotsverk. Duch, sum hann vanliga verður kallaður, viðgekk undir avhoyringum í gjár, at tað kambodiska fólkið var fyri óhugnaligum lýðingum árini frá 1975 til 1979, tá Reyðu Khmerarnir stýrdu landinum. Sjálvur var hann leiðari í einum fongsli, har umleið 16.000 fólk vórðu illa viðfarin og síðani myrd. Tann serligi dómstólurin, sum ST hevur skipað, skal nú fella dóm ímóti Duch, skrivar Reuters.



## Óttast yvirgang

Eftir leikskránni skuldu danirnir Mathias Boe og Carsten Mogensen spæla ímóti eysturríkarunum Jürgen Koch og Peter Zauner í heimsmeistarakappingini í badminton, sum er í India í hesum døgum, men dysturin varð av ongum, tí eysturríkararnir fóru heim aftur til Eysturríkis. Franska tíðindastovan AFP skrivar, at tað var óttin fyri yvirgangi, sum fekk teir at fara heimaftur. Ein annar eysturríkskur leikari hevur hinvegin valt at halda fram í kappingini, sum er í býnum Hyderabad. Enska landsliðið í badminton er eisini farið heimaftur orsakað av vandanum fyri yvirgangi.

# Nógv tos, men einki ítøkiligt

**- Vit hava verið á einum fundi saman við umboðum fyri Klaksvíkar kommunu. Ætlanin var at hava ein nýggjan fund nú í august, sum borgarstjórin skuldi taka stig til, men enn hevur hann ikki verið, sigur formaðurin í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Arthur Guðjónsson**

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag hevur einar 250 limir, og tá fiskavirkið á Kósini læt aftur seint í 2008, mistu millum 40 og 50 av limum felagsins arbeiði.

Í Klaksvík eru arbeiðsmenn og arbeiðskvinnur í hvør sínum felag, og tá Kósin stongdi, mistu út við 100 kvinnur, sum eru limir í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, arbeiði.

Soleiðis hóvdu umleið 140 limir í hesum báðum feløgum sítt starv á Kósini – eitt stórt arbeiðspláss, sum í løtuni ikki er meira, og sum eftir øllum at døma verður stongt í minsta lagi eina tíð aftrat.

### Bert tos

Arthur Guðjónsson sigur, at sum formaður í arbeiðsmannafelagnum hevur eingin vent sær til hansara við nøkrum nýggjum um Kósina.

- Vit hoyra nógvar søgur, og nógv verður tosað, men eg havi einki ítøkiligt hoyrt um nakað, og søgurnar kunnu vit ikki brúka. Eingin hevur sett seg í samband við okkum um nakað sum helst ítøkiligt.

Áður var vanligt, at arbeiðarafeløg áttu part í vinnuliga virkseminum á staðnum, men hetta er í flestu førum ein farin tíð.

- Nei, vit áttu onga krónu í Kósini, tá virkið læt aftur, og eg havi skilt, at arbeiðskvinnufelagið heldur ikki átti part í virkseminum, sigur Arthur.

### Av bygdini

Formaðurin í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag sigur, at síðan virksemið á Kósini helt upp at, hava nakrir av limum felagsins fingið arbeiði aðrastaðni, eitt nú í Leirvík og á Skálafjørðinum.

- Men tað eru serliga tey yngru, sum eru farin av bygdini at finna sær arbeiði, meðan aðrir limir enn ganga arbeiðsleysir.

Á leið sama mynstur man síggjast hjá limunum í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Arthur Guðjónsson harmast um, at stóra arbeiðsplássið, sum Kósin í Klaksvík hevur verið gjøgnum so mong ár, framhaldandi liggur uttan vinnuligt virksemi – og uttan, at nakað ítøkiligt røkist fyri, at virkið letur uppaftur í bræði.

### Útlit til fisk

Sjálvur hevur arbeiðsmannafelagsformaðurin arbeitt á Kósini í nøkur ár, og meðan JFK og Hanus Hansen ráddu fyri borgum, var hann eitt nú formaður fyri skering og salting.

- Seinnu árini havi eg so bara verið vanligur arbeiðsmaður á virkinum, leggur hann aftrat.

Fyrst í komandi ári hevur Arthur Guðjónsson verið formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag í tvey ár.

- Sambært útlitunum, sum fiskifrøðingar nú hava lagt fyri dagin, sær ikki so galið út á landgrunninum. Tí kunnu vit bert vóna, at hetta fer at eggja íleggjarum at taka neyðug stig, sum kunnu føra til, at virksemið aftur verður á Kósini, sigur formaðurin í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, sum tó noyðist at ásanna, at felagið einki ítøkiligt "preið" hevur fingið av nøkrum sum helst slag.






*Tað er deydligt við Kósabrúnna, nú einki virksemi hevur verið á flakavirkinum, síðan virkið læt aftur seint í 2008*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Deydligt á Kós

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsdagin, tá Sosialurin var í Klaksvík, og vit vóru ein túr eftir Kósabrúnni, var rættiliga deydligt í hesum annars so arbeiðsríka umhvørvi gjøgnum mong ár.

Sum einasta skip við bryggjuna lá línuskipið Fugltúgvan, sum eins og onnur línuskip í Klaksvík hevur ligið seinastu tíðina.

Ein arbeiðsbilur hjá Klaksvíkar kommunu stóð uppi við fiskavirkið, og her fekst ein maður, sum starvast hjá kommununi, við at leggja el-kaðlar í jørðina beint frammanfyri fiskavirkið.

Maðurin vissaði okkum um, at hetta hevur einki við